## Ikki rætta vápnið

Tá svenska løgreglan í síðstu viku kom fram á eina skammbyrsu undir einari húsarannsókn, varð hildið, at talan kundi vera um skammbyrsuna, sum Olof Palme, forsætisráðharri varð skotin við í 1986.

Løgreglan vísti m. a. á, at skammbyrsan varð funnin í einum umhvørvi, sum Christer Pettersson plagdi at halda til í um tað mundið, tá Palme varð myrdur. Pettersson varð leingi skuldsettur fyri at hava myrt forsætisráðharran.

Men í gjár avsannaði svenska løgreglan, at tann funna skammbyrsan hevði nakað við Palme-morðið at gera.

## Nei til kríggj

Fleiri, sum fyrr hava fingið friðarheiðursløn Nobels, mótmæla nú amerikansku ætlanini at leypa á Irak.

Á einari ráðstevnu í Roma seinastu dagarnar hava heiðurslønarvinnararnir viðgjørt fleiri altjóða spurningar so sum avdubbing, bardagan ímóti yvirgangi, stríðið í Miðeystri og mannarættindini. Í einari yvirlýsing frá ráðstevnuni stendur, at altjóða samfelagið eigur ikki at góðtaka, at kreppur verða loystar við vápnamegi.

Millum teirra, sum hava skrivað undir yvirlýsingina, eru fyrrverandi sovjetski forsetin Mikhail Gorbatjov, sum fekk friðarheiðursløn Nobels í 1990, og fyrrverandi polski forsetin, Lech Walesa, sum fekk sama heiðurin í 1983. Millum hini vóru eitt nú norðurírska Betty Williams, sum fekk Nobel-friðarheiðurslønina í 1976, og bretin Joseph Rotblat, sum fekk heiðurslønina í 1995.

## Ræna Kongo

Leiðandi politikarar, heryvirmenn og brotsmenn kappast nú um at ræna virði fyri milliardir av dollarum í Kongo, stendur í einari nýggjari frágreiðing hjá ST.

Herfyri tóku grannalondini hjá Kongo sínar hermenn úr landinum, men sambært ST eru tað heryvirmenn úr hesum somu londunum, sum skipa fyri at ræna landsins virði saman við brotsmannabólkum. Sambært ST eru tað serliga leiðandi heryvirmenn í Uganda, sum standa fyriráninum í Kongo. Zimbabwe er eisini upp í leikinum, og tað sama eru fýra belgisk og eitt bretskt felag, sigur ST.

Í Kongo er nógv náttúruríkidømi so sum gull, diamantar, kopar og kobolt, og júst stríðið um hesi ríkidømi var drívmegin í tí fýra ára langa borgarakrígnum, sum verður hildið at hava kravt umleið tvær milliónir mannalív.

## Ikki bíligari brennivín

Norsku bryggjaríini mótmæla nú politiska tosinum um at lækka avgjøldini á víni og brennivíni.

Tað er ikki stjórnin, sum hevur ætlanir um at gera vínið og brennivínið bíligari. Men Framburðsflokkurin, sum er stuðulsflokkur hjá stjórnini, hevur kravt, at avgjøldini verða lækkað, nú samráðingar eru um fíggjarlógina fyri 2003. Kravið hjá flokkinum er, at avgjøldini skulu lækka 25 prosent, og flokkurin heldur hetta vera neyðugt fyri at avmarka tað nógva heimabryggið.

Men bryggjaríini, sum bryggja øl, eru ímóti uppskotinum. Tey siga, at lækkingin fer bara at gera, at fleiri norðmenn fara at drekka brennivín heldur enn øl. Harafturat kann lækkingin fara at kosta arbeiðspláss á bryggjaríunum, siga tey.

# Bush dregur í land

**Amerikanski forsetin, George W. Bush, er nú til reiðar at gera enn eina roynd at loysa Irak-kreppuna við samráðingum, og hann krevur heldur ikki longur, at Saddam Hussein skal frá**



IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Amerikanski forsetin er ikki so avgjørdur í Irakmálinum longur. Í gjár segði George W. Bush, at Saddam Hussein kann verða sitandi við valdið í Irak, men so er kravið, at hann heldur allar samtyktir hjá ST.

Eygleiðarar í Washington siga, at Bush hevur lagt á annan bógv í Irak-málinum, men talsmenn hjá Hvítu Húsunum vóru tó skjótir at gera vart við, at forsetin hevur ikki broytt støðu.

– Mál okkara er framvegis, at Irak eigur at fáa eitt annað stýri, tí sitandi stýrið fer ikki at broyta sín politikk, segði Bush og vísti á, at undanmaður hansara, Bill Clinton, hevur somu uppfatan.

Bush legði tó afturat, at er Saddam Hussein til reiðar at laga seg eftir samtyktunum hjá ST, kann hann verða sitandi, tí tað hevði í sjálvum sær verið ein broyting í irakska politikkinum.

USA legði í gjár eitt nýtt uppskot til samtyktar fyri hinar føstu limirnar í ST-trygdarráðnum, Bretland, Frakland, Russland og Kina. Um uppskotið segði Bush, at amerikanska stjórnin hevur roynt ta diplomatisku leiðina fyrr og er til reiðar at gera tað eina ferð afturat.

– Men kemur einki burtur úr teimum diplomatisku royndunum, finnast aðrar leiðir, segði forsetin ávarandi.

Amerikanskir hernaðarserfrøðingar hava fyrr sagt, at eitt álop á Irak eigur at verða sett í verk í januar ella í februar, tí tá eru umstøðurnar tær bestu. Hetta vita irakar eisini, og teir royna tí at draga tíðina út.

Av teimum føstu limunum í trygdarráðnum er tað serliga Frakland, sum heldur aftur. Franska stjórnin hevur sagt, at tað kann gerast neyðugt við einum hernaðarligum átaki ímóti Irak, men stjórnin hevur samstundis kravt, at allar politiskar og diplomatiskar leiðir skulu roynast fyrst.

Eygleiðarar í Washington siga, at tað seinasta amerikanska uppskotið til samtyktar ber týðiliga boð um, at amerikanarar hava valt at slaka fyri fransmonnum fyri at fáa teir føstu limirnar at taka undir við uppskotinum.

Vápnaeftirlitsmenninir hjá ST hava boðað frá, at teir eru til reiðar at fara til Irak, so skjótt teir fáa boð um tað.

# Írland krevur innlit í loyniliga frágreiðing um Sellafield-verkið

**Írska stjórnin stevnir nú Bretlandi fyri altjóða dómstólin í Haag við kravi um, at stjórnin í Dublin skal fáa innlit í eina loyniliga frágreiðing um kjarnorkuendurvinningarverkið Sellafield**

SELLAFIELD-VERKIÐ
*Árni Joensen:*

Írska stjórnin hevur leingi víst á, at útlát frá kjarnorkuendurvinningarverkinum Sellafield dálkar Írska Havið, og stjórnin í Dublin vil tí vera við, at Bretland brýtur tann sonevnda OSPAR-sáttmálan um forboð ímóti dálking í Norðuratlantshavinum.

Sáttmálin, sum er frá 1998, álegggur øllum limalondunum í ST at gera alt, sum gerast kann, til tess at forða fyri, at havið verður dálkað.

Hetta er fyrstu ferð, at eitt mál av hesum slagnum verður lagt fyri altjóða dómstólin í Haag.

Írska stjórnin royndi í fjør at forða fyri, at bretar tóku eitt nýtt verk í nýtslu í Sellafield. Hetta var eitt sokallað MOX-verk, sum er ætlað til at endurvinna plutonium og uran-oksid. Stjórnin í Dublin legði málið fyri sjóvinnudómstólin hjá ST, sum vísti málinum frá sær.

Hesaferð hava írar so valt at fara til altjóða dómstólin í Haag við kravi um kunning og við kravi um innlit í bretskt skjalatilfar. Bretsku myndugleikarnir hava fingið tvær frágreiðingar um tað nýggja MOX-verkið, men stjórnin í London hevur sýtt fyri at lata onnur lond fáa innlit í frágreiðingarnar.

Tað er hesar frágreiðingarnar, írar vilja sleppa at síggja.

# ítróttur

Nr. 203 • mikudagur • 23. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Meistarar og uppflytarar taptu

**Mest óvæntaða úrslitið í meistaradeildini hjá kvinnum kom helst á Kambsdali, har ÍF vann sera spennandi dyst á TB, og yvir høvur tykist flogbóltskappingin hjá kvinnum at gerast heilt spennandi í vetur**



*Fyri fyrstu ferð skuldu KÍF royna seg í meistaradeildini, og byrjanin kundi neyvan verið harðari enn var, tá tær í fyrsta dystinum skuldu royna seg á útivølli móti Mjølnir*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyri fyrstu ferð nakran tíð skuldu kvinnurnar hjá KÍF spæla dyst í meistaradeildini, tá tær saman við Mjølnir settu sjøtul á nýggja flogbóltsárið.

Hetta hendi í Klaksvík, har Mjølnir tók ímóti nýggja liðnum, og størri uppgávu kann ein uppflytari neyvan fáa, tí Mjølnir er um nakað felagið, sum hevur myndað føroyskan kvinnuflogbólt seinnu árini. Eisini hóast tær nú í tvey ár hava sæð meistaraheitið fara aðrar vegir.

Í fyrsta dystinum á árinum var tó eingin ivi. Mjølnir liðið, sum framhaldandi er ein góð blanding av bæði royndum og nýggjum kreftum, vann tryggan 3-0 sigur, men fyri tað eiga tær hjá KÍF ikki at fara niður við høvdinum. Setningur teirra má fyrst og fremst vera at fáa neyðugu royndirnar í grundspælinum, umframt at nøkur stig helst skulu skavast saman, og so verður tað av álvara álvara í endaspælinum, tá sessurin í deildini skal bjargast.

### Meistararnir taptu

Sunnudagin vórðu so tveir dystir leiktir í kvinnudeildini. Vesturi í Vágunum dystaðust Dráttur og Fleyr, og her gjørdist úrslitið, at Dráttur vann dystin 3-1. Talan í øllum fýra førunum um jøvn sett, men tá samanum kom, vóru tað tær á heimaliðnum, sum vóru tær stinnaru. Men einki er at ivast í, at fyri Fleyr mundi avrikið kennast sum ein fløvi, eftir at liðið seinnu árini hevur verið langt ífrá styrkini, sum tær áður hava havt.

Mest óvæntaða úrslitið kom tó helst á Kambsdali, har tað í fimm sepnnandi settum eydnaðist ÍF at vinna á meistaraliðnum úr TB. Leingi bendi eisiini á, at ÍF skuldi vinda burtur úr meistarunum, men í einum spennandi triðja setti eydnaðist TB at fáa vend í. Tað var eisini um reppið, at tað eydnaðist TB at fáa sigurin til høldar, men í avgerandi bóltunum vóru fuglfarðakvinnurnar kaldari, og vunnu tær at enda 16-14.

# Broytingar at hóma

**Hóast tað enn bert er liðið eitt umfar av flogbóltslandskappingini, tykjast fleiri broytingar gera seg galdandi í styrkisbýtinum millum tey fimm feløgini í meistaradeildini hjá monnum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tveir dystir vórðu leiktir í meistaradeildini hjá monnum, sum aftur í ár telir fimm lið.

Leygardagin dystaðust Mjølnir ímóti meistaraliðnum úr Fram, og her vann heimaliðið tryggan sigur, tó at Fram fyrstu løtuna skelkaði við at taka fyrsta settið.

Í mun til árið í fjør, so er einki at ivast í, at styrkislutfallið millum liðini bæði er broytt munandi. Fram hevur undan árinum sagt farvæl við Rúna Weihe, sum hendan veturin fer at spæla flogbólt á Kambsdali, og



*Meistaraliðið úr Fram tykist ikki hava somu styrki sum í fjør, og í Klaksvík vóru teir greitt við undirlutan, tá teir vitjaðu styrkta Mjølnir-liðið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

hinvegin hava Mjølnir styrkt um liðið við tveimum bulgarskum leikarum.

Sum nevnt, so fekk Fram skapt eitt sindur av øsing í, tá teir tóku sær av fyrsta settinum í Klaksvík, men eftir hetta fekk Mjølnir tó tamarhald á, og tá lagt varð saman, høvdu teir vunnið ein hampuliga tryggan 3-1 sgiur.

Sunnudagin var so dystur í Vágunum, har SÍ tók ímóti Fleyr. Fleyr var í fjør so nær við meistaraheitið, sum hugsast kann, men í ár verður støðan fyri teirra viðkomandi helst væl øðrvísi. Mest sum allir teir royndu leikarar, sum í fjør mannaðu liðið, hava nú lagt flogbóltin á hillina, og tí verður árið í ár fyrst og fremst ein roynd at byggja eitt nýtt lið upp.

Sørvingar tykjast hinvegin ætla sær at halda fram eftir sama leisti sum í fjør.

Jón Niélsen er farin til Fram, men í aðrar mátar tykist liðið framhalandi rættiliga sterkt, og sunnudagin var í øllum førum eingin ivi. Til samans vann Fleyr ikki meira enn 42 bóltar, og tað munaði lítið mótiu teimum 75, sum SÍ ognaði sær.

ÍF var ikki í dysti hetta vikuskiftið, men einki er at ivast í, at tað verður spennandi at síggja, hvussu árið fer at hilnast hjá teimum. Liðið hevur verið fyri nøkrum broytingum, men við tilgongdini av Rúna Weihe tykjast kantarnir at kunna gerast enn sterkari, enn teir hava veri undanfarnu árini, og so er spurningurin, um tað er nóg mikið, til at taka dystin upp móti fyrst og fremst Mjølni og SÍ.